Starvslýsing

Heimatænastan

## Húsavørður til Røktarheimið á Mørkini

Søkt verður eftir húsavørði til Røktarheimið á Mørkini at byrja 01. November 2007.

Arbeiðsuppgávur eru m.a.:
• Røkja bygningin og øki uttanum
• Tryggja at el, vatn, hiti og sanitetsviðurskiftini eru í lagi
• Røkja ventilatiónina
• Tryggja at eldsløkkiskipanin er í lagi

**Vit vænta av tær, at tú:**
• hevur handverkaraútbúgving
• hevur koyrikort

**Setanar- og lønarviðurskifti**
Setunarstaðið er Nærverkið við tænastu í løtuni í Heimatænastuni í øki 2. Lønar- og setanarviðurskifti eru sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og avvarðandi yrkisfelag.

Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til Kristbjørg Toftegaard, leiðara tlf. 471050/282054.

Umsókn saman við prógvi, og møguligum viðmælum verður at senda til :

Røktarheimið á Mørkini
Stílað: Kristbjørg Toftegaard, leiðari
Neystavegur
435 Streymnes

**Umsóknarfreist: 19. Oktober 2007 kl. 15.00**

## Køksrøktarstarvsfólk

Søkt verður eftir einum starvsfólki til Røktarheimið á Mørkini í Streymnesi at byrja 01. November 2007

Arbeiðið fevnir um matgerð, planlegging av matarskrá, innkeyp og annað arbeiði

Vit vænta av tær, at tú:
• hevur viðkomandi útbúgving
• dugir at arbeiða sjálvstøðugt og hugsar nýskapandi

**Setanar- og lønarviðurskifti**
Talan er um fulltíðarstarv. Setunarstaðið er Nærverkið við tænastu í løtuni í Heimatænastuni í øki 2. Lønar- og setanarviðurskifti eru sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og avvarðandi yrkisfelag.

Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til Kristbjørg Toftegaard, leiðara tlf. 471050/282054.

Umsókn saman við prógvi, og møguligum viðmælum verður at senda til :

Røktarheimið á Mørkini
Stílað: Kristbjørg Toftegaard, leiðari
Neystavegur
435 Streymnes

**Umsóknarfreist: 19. Oktober 2007**

Á Røktarheiminum á Mørkini búgva 32 búfólk, sum búleikast í fýra eindum við átta búfólkum á hvørjari eind.

**Les meira á www.naerverk.fo / leys størv**

Nærverkið kemur út til borgaran at veita tænastur, ið fevna um eitt nú stuðul, tilboð til borgarar við serligum tørvi og tænastur til barnafamiljur og eldri. Nærverkið er sjálvstøðugur stovnur undir Almanna- og heilsumálaráðnum. Umframt Meginskrivstovuna, ið hevur yvirskipaðu leiðsluna, eru fýra deildir: Heimatænastan, Trivnaðartænastan, Stuðulstænastan og Barnatænastan. Nærverkið leggur áherðslu á nærleika, umsorgan og professionalismu í øllum lutum. Umleið 1400 fólk starvast í Nærverkinum.

NÆRVERKIÐ

Meginskrivstovan, Postsmoga 3037, 110 Tórshavn, Tel 30 40 20, Faks 30 40 10, meginskrivstovan@naerverk.fo

www.naerverk.fo

Starvslýsing

Trivnaðartænastan

## Pedagogur til Sambýlið í Stoffalág

Søkt verður eftir pedagogi til Sambýlið í Stoffalág at byrja at arbeiða sum skjótast.

Í sambýlinum í Stoffalág búgva 5 fólk, ið hava tað felags, at tey eru ung, men tørvurin og eyðkennini hjá tí einstaka persóninum eru ógvuliga ymisk. Tað pedagogiska arbeiði í gerandisdegnum verður gjørt við at taka støði í tí einstaka og harfrá veita neyðuga hjálp,stuðul og vegleiðing og avbjóðingin frameftir verður at menna sambýlið til nýggjar uppgávur.

Arbeiðstíðirnar á sambýlinum eru skiftandi og talan er um bæði dag / kvøld / nátt / halgidagar og 3. hvørt vikuskifti

**Setanartreytir:**
Setanarøkið er Nærverkið og tænastustaðurin er í løtuni í Trivnaðartænastuni. Starvið verður sett sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Fíggjarmálaráðið. Um pedagogur, ið frammanundan er tænastumaður, verður settur í starvið, heldur tænastumannasetanin fram. Um ongin pedagogur søkir starvið, verður starvið sett við hjálparfólki sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Fíggjarmálaráðið.

**Nærri fæst at vita um** starvið við at venda sær til leiðaran á tlf. 214664

**Umsóknir við hjáløgdum CV og prógvum verða at senda til:**

Sambýlið
Stoffalág 64
Stílað: leiðarin
FO-100 Tórshavn

**Umsóknarfreist: 19.10.2007**

## Pedagogur til Verkhúsið Stíggjur í Saltangará

Søkt verður eftir pedagogi til Verkhúsið Stíggjur í Saltangará til setan 01. novembur 2007.

**Setunarviðurskifti:**
Starvið verður sett sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Føroya Pedagogfelag. Um pedagogur, ið frammanundan er tænastumaður, verður settur í starvið, heldur tænastumannasetanin fram, og verður lønin sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Føroya Pedagogfelag.

**Nærri upplýsingar fáast við** at venda sær til leiðaran á tlf 448944 ella 218944

**Umsókn:**
Umsóknir við hjáløgdum próvskjølum, viðmælum og C.V. skulu sendast til:

Verkhúsið Stíggjur
Heiðavegur
Fo-600 Saltangará
Stílað: Leiðarin

**Umsóknarfreist: 19.10.2007**

## Pedagogur til Verkhúsið í Sørvági

Søkt verður eftir barnsburðaravloysara í tíðarskeiðnum 1. novembur 2007 til 30. september 2008. Arbeiðstíðin er 25 tímar um vikuna.

Verkhúsið í Sørvági er eitt dagtilboð til fólk við serligum tørvi, har arbeitt verður við ymisum handaligum, lagað eftir evnum og tørvi hjá hvørjum einstøkum brúkara.

**Setanartreytir:**
Starvið verður sett sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Føroya Pedagogfelag og lønt stigini 11-19. Um eingin pedagogur søkir starvið, skilar Trivnaðartænastan sær rætt til at seta fólk við aðrari heilsufakligari útbúgving og verður starvið tá lønt sambært sáttmála millum avvarðandi yrkisfelag og Fíggjarmálaráðið.

**Nærri upplýsingar** um starvið fáast við at venda sær til Súsan Tavsen á tlf 333980 ella Poulinu Johannesen leiðara á tlf 218944.

**Umsókn:**
Umsókn við avriti av prógvi og møguligum viðmælum verður send til:

Verkhúsið í Sørvági
Ovarivegur 29
FO- 380 Sørvági

**Umsóknarfreist: 20. oktobur 2007.**

**Les meira á www.naerverk.fo / leys størv**

Nærverkið kemur út til borgaran at veita tænastur, ið fevna um eitt nú stuðul, tilboð til borgarar við serligum tørvi og tænastur til barnafamiljur og eldri. Nærverkið er sjálvstøðugur stovnur undir Almanna- og heilsumálaráðnum. Umframt Meginskrivstovuna, ið hevur yvirskipaðu leiðsluna, eru fýra deildir: Heimatænastan, Trivnaðartænastan, Stuðulstænastan og Barnatænastan. Nærverkið leggur áherðslu á nærleika, umsorgan og professionalismu í øllum lutum. Umleið 1400 fólk starvast í Nærverkinum.

NÆRVERKIÐ

Meginskrivstovan, Postsmoga 3037, 110 Tórshavn, Tel 30 40 20, Faks 30 40 10, meginskrivstovan@naerverk.fo

www.naerverk.fo

# Frítíðarundirvísing

## á Oyrarbakka veturin 2007/2008

| | | | |
|---|---|---|---|
| Motiónsfimleikur menn | Mánadag 21.00 – 22.18<br>Fríggjadag 21.00 – 22.18 | Erling Petersen | 423194 |
| Klænkiskeið | Hósdag 18.30 – 22.00 | Edna Einarsson | 217089 |
| Kórsangur | Mánadag 19.00 – 21.35 | Hans Olivur Joensen | 228129 |
| Dreying | Mánadag 18.00 – 21.30 | Terji Johannesen | 580084 |
| Dreying | Mánadag 07.50 – 09.20 | Terji Johannesen | |
| VHF við DSC | Mánadag 19.00 – 22.20 | Steintór Jacobsen | 228210 |

Øll undirvísing er treytað av nóg stórari luttøku og góðkenning frá myndugleikunum. Luttøkugjaldið er 300 kr fyri hvørja lærugrein, tó 500 kr fyri motiónsfimleik menn, og tað skal verða flutt á konto skúlans nr. 6460-1001908 í Føroya Banka beinanvegin, tá ið undirvísingin er byrjað. Skúlanæmingar gjalda 30 kr. Fráboðan og nærri upplýsingar hjá faklærara.
Byrjað verður í viku 43, undantikið klænkiskeiðið, ið byrjar eftir nýggjár.

**Felagsskúlin á Oyrarbakka**
**Tlf. 422084/212084**

Sosialurin
Sosialurin i